## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Færøernes Kommando:

# Tvey starvsfólk heiðrað





*Stjórin fyri Færøernes Kommando, Jan T. Leisborch, (t.h. á myndunum) handar her heiðurteknið til ávikavist Søren Skinderholm í Hoyvík og Carsten Thomsen í Kvíkvík*

*Myndir: Færøernes Kommando*

31. januar 2005 handaði stjórin fyri Færøerne Kommando tveimum starvsfólkum heiðurstekin fyri trúgva tænastu.

Hetta er ein gomul siðvenja, sum bleiv stovnað 29. januar 1801 av H. M. Kong Christian den VII undir heitinum "Hæderstegnet for god tjeneste ved Søetaten".

Síðan tá hevur sjóverjan hvørt ár heiðrað starvsfólkum, sum hava gjørt tænastu í verjuni í samfull 25 ár.

H. M. drotning Margretha hevur í ár givið tveimum starvsfólkum hjá Færøernes Kommando hetta heiðurstekin. Teir eru ávikavist sersjant Søren Skinderholm í Hoyvík og Carsten Thomsen í Kvívík.

Skeiðsdepilin við Markagilsvegin:

# 18 diplomleiðarar fingið prógv

**Mánadagin 31. januar 2005 var hugnaløta á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn í samband við at fyrsta diplomleiðaraliðið á Skeiðsdeplinum var liðugt við útbúgvingina innan generella leiðslu. Tilsamans 18 leiðarar fingu prógvini handað.**



*Aftara rað f.v.: Anna Maria Oskarson og Ása Davidsen, frá Heimarøktini og Serforsorgini, Eva Mortensen, frá Landssjúkrahúsinum, Finn Larsen, frá Heimarøktini og Serforsorgini, Hans Andor Johannesen, frá Útvarpi Føroya, Hanus Højgaard, frá P/F Elektron, Hartvig Joensen, frá Pf. Havsbrún, Høgni Joensen, frá Tórshavnar Kommunu, og Jaspur Langgaard, frá Bláa Krossi Føroya.*
*Fremra rað f.v.: Jógvan Olsen, frá P/F Elektron, Marjun Holm, frá Argja Skúla, Marjun Poulsen og Naina Túgvustein, frá Landssjúkrahúsinum, Petur Joensen, frá Oljumálaráðnum, Rókur Tummasarson, frá Innlendismálaráðnum, Sonja Klein, frá Heimarøktini í Miðvági, Ulla Joensen, fra P/F Elektron, Wanja Petersen frá Tórshavnar Kommunu, og Georg Suðurgarð leiðari á Skeiðsdeplinum.*

*Mynd: Bárður Lydersen*